

Johan Castberg-oljuætlanin kann gerast ov dýr um oljuprísurin ikki hækkar munandi.

# Oljuframleiðslan kann minka munandi

**Jógvan Hugo Gardar**

30.11.2014 - 22:25

Oljan.fo

Tá OPEC á fundinum í Wien hósdagin samtykti at felagsskapurin ikki ynskir at minka um oljuframleiðsluna, so fekk hetta beinanvegin avleiðingar fyri oljuprísin, ið skjótt nærkaðist 70 dollarum fyri fatið. Og prísurin kann lækka enn meir komandi vikurnar.

Lági oljuprísurin kann fáa stórar avleiðingar fyri norska búskapin, nú oljuinntøkurnar lækka, samstundis sum bláblåa stjórnin hevur lova veljarunum skattalækkar komandi árini.

Oljugreinarin Espen Erlingsen hjá Rystad Energy sigur við E24, at um oljuprísurin heldur sær á einum støði sum er niðanfyri 73 dollarar fatið í 2015, so minka skattainntøkurnar hjá norska landskassanum frá oljuvirkseminum við eini helvt.

Samstundis merkir ein so lágur oljuprísur at fleiri av útbyggingarætlanunum í Norðsjónum ikki fara at loysa seg.

Hann vísir á at talan kann vera um at tvær av stóru útbyggingunum á norska landsgrunninum, har íløgur fyri meir enn 100 milliardir krónur skulu gerast, fara at verða raktar av lága oljuprísinum.

Erlingsen vísir á at Johan Castberg-økið í Barentshavinum, ið Statoil er fyristøðufelag fyri, ikki ber seg um oljuprísurin er lægri enn 80 dollarar. Castberg-ætlanin kostar knappar 60 milliardir krónur.

Hann sigur at ein onnur av útbyggingunum hjá Statoil, sokallaða Snorre C-ætlanin, hon hevur eisini 80 dollarar sum minstamark fyri at bera seg. Hendan útbyggingin kemur at kosta einar 40 milliardir. Avgerð um útbygging skal takast í 2016.

Eisini Zidane-útbyggingin í Norður-Noregi og Wisting í Barentshavinum skulu sambært Erlingsen hava millum 80 og 90 dollarar fyri fatið um tær skulu bera seg.

Tann størsta av nýggju útbyggingunum á norska landgrunninum, Johan Sverdrup, ið liggur vestanfyri Stavanger, loysir seg framvegis. Hendan ætlanin ber seg við tí sum svarar til ein oljuprís sum liggur um 40 dollarar, sigur Erlingsen.

Norska stjórnin hevur í sínum fíggjarlógaruppskoti lagt til grund at oljuprísurin kemur at liggja um 650 norskar krónur fyri fatið av olju í 2015. Í løtuni liggur oljuprísurin fyri eitt fat um 500 norskar krónur, so her er talan um nógvar pengar sum ikki koma inn í landskassan um oljuprísurin ikki hækkar komandi árið. Í fyrstu atløgu er tó talan um lægri inntøkur hjá norska oljugrunninum, ið er tann sum tekur ímóti meginpartinum av yvirskotinum frá oljuframleiðsluni. Bert í evarska lítil partur av oljuyvirskotinum endar í dag beinleiðis á fíggjarlógini